


# Vilja hava fleiri kvinnur í oljuvinnuna

**Jan Müller**

25.02.2014 - 19:48

Oljan.fo

Áhugafelagið hjá norsku oljuvinnuni “Norsk olje og gass” roynir nú á fimta sinni at eggja kvinnum til at royna seg í olju- og frálandavinnuni.

6. mars fara Norsk olje og gass og Maritimt Forum í felag at skipa fyri tiltakinum ”Jenter for realfag” fyri fimtu ferð – hetta fyri at skapa áhuga fyri oljuvinnuni millum ungar kvinnur. Endamálið er at vísa á møguleikarnar hjá kvinnum at arbeiða í hesi størstu vinnuni í Norra.

“Fyri at økja um vitanina um olju og sjóvinnu millum kvinnur, hava vit í fleiri ár skipað fyri slíkum tiltøkum. Vit brúka fólk, sum arbeiða og hava drúgvar royndir í hesi vinnu, sum frálærufólk, alt frá studentum til stjórar. Hesi greiða so frá sínum útbúgvingum og royndum,” sigur Thina Hagen hjá Norsk Olje og Gass. Tiltakið byrjar beint undan sjálvum kvinnudegnum 8. mars, og tað er ikki av tilvild.

“Vit hava lagt upp til at skipa fyri hesum undan kvinnudegnum fyri at vísa, at tað er loyvt at tosa um kvinnur og karrieru, hóast man arbeiðir í einum ídnaði, har tað næstan bara eru mannfólk. Sætt at siga, so vita kvinnur í dag lítið um, hvørji fak og lærugreinar kunnu lata hurðar upp fyri kvinnum í oljuvinnuni,” sigur Hagen, sum ger vart við, at kvinnurnar eru avgjørt við undirlutan í hesi vinnu, og tað er nakað, sum eigur at verða broytt.

Hóast kvinnur eru 60% av øllum studentum í Norra, so eru tað bara 20%, sum lesa innan verkfrøðingafakini. Av teimum, sum í dag arbeiða í frálandavinnuni, telja kvinnurnar bara 12%, nakað, sum hevur verið óbroytt seinastu 30 árini, sigur Hagen.

Kelda Norsk olje og gass